# Pedagogur/ hjálparfólk søkist

Undir Almanna- og Heilsumálstýrinum við fyribils tænastu á Bóndaheygi 14, er eitt tænastumannastarv sum pedagogur leyst at søkja til setan skjótast tilber.

Talan er um eitt fulltíðarsetarv, sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki 11/17 + viðbót.

Í Sambýlinum á Bóndaheygi 14 búgva 5 menningartarnað fólk við serligum tørvi.

Talan er um vaktarbeiði bæði dag, kvøld og nátt.

Viðkomandi, sum settur verður, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og skal vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í sínum arbeiði, skal vera opin fyri nýhugsan og hava vilja til at samstarva við onnur. Umsøkjarin skal eisini vera førur fyri at luttaka í frítíðartiltøkum saman við húsfólkunum, og vera virkin á summarhússtykkinum, har húsfólkini hava teirra dagliga arbeiði.

Dentur verður lagdur á, at tann, sum settur verður, er væl fyri sálarliga og kroppsliga.

Um eingin skikkaður pedagogur søkir, verður starvið sett øðrum uttan pedagogútbúgving í eitt fyribils tíðarskeið, lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag fyri hjálparfólk.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jarvin Feilberg Hansen fyristøðufólk ella á tlf. 315917.

Skrivlig umsókn, við prógvi, viðmælum v.m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 26.01.2001 og sendast til:

**Sambýlið**
att. Jarvin F. Hansen
Bóndaheygur 14
FO-100 Tórshavn
tlf. 315917

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Mazda 323 1.5 LX Sedan
**Árg.:** 1997
**KM.:** 82.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast hjá Berg Motors, Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Tlf. 345727 – 214166
fax nr. 345607
at hitta millum kl. 13.00–15.00

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Pedagogur søkist

Undir Almanna- og Heilsumálastýrinum og stovnum undir tí, við fyribils tænastu í Sambýlinum Undir Gráasteini 4 er eitt starv sum pedagur leyst til setan 01.03.2001.

Í sambýlinum búgva 5 autistiskir menn.

Tað er ein fyrimunur at hava vitan um autismu og serliga arbeiðsháttin, ið krevst til hetta brekið. Ítróttur er ein týdningarmikil partur av arbeiðnum m.a. renning og svimjing, og tí krevst, at umsøkjarin er væl fyri kroppsliga.

Arbeiðstíðirnar fevna um morgun-, kvøld- og náttarvaktir.

Starvið er tænastumannastarv sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið, lønt í lønarflokki 11/17 + viðbót.

Nærri fæst at vita um starvið frá fyristøðufólkinum á tlf. 319270.

Umsóknarfreistin er 05.02.2001 og skulu umsóknir saman við prógvi, viðmælum v.m. sendast til:

**Sambýlið**
Undir Gráasteini 4
FO-100 Tórshavn
Att.: fyristøðufólkið

# Pedagogar

Søkt verður eftir trimum pedagogum at arbeiða 27 tímar, 30 tímar og 32 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2001.

Lønar- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýrið. Lønt í lønarflokki 11.

Barnagarðurin er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at hava umsorgan fyri børnum í aldrinum 0 til 7 ár og á einum kristnum støði at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

Vit vænta, at tú saman við okkum skapar eitt gott umhvørvi á stovninum.

Meira fæst at vita við at tosa við leiðaran á tlf. 455557

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 15 februar.

**Dr. Margrethu Barnagarður**
Gerðagøta
FO-700 Klaksvík

# Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hetta tín áhuga, so ring ella skriva til:

frants restorff

Tórsgøta 13
Postsmoga 41
110 Tórshavn
Tlf. 311060

# Eysturoyar Røktar- og ellisheim

**620 Runavík**

Søkt verður eftir ØKONOMU – 40 tímar um vikuna – at byrja skjótast ella eftir nærri avtalu.

Løn- og setunarviðurskifti sambært avtalu við Økonomafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá økonomuni á tlf. 448617 ella 448201, lokal 29.

Umsókn, saman við prógvi, viðmæli v.m. skal vera komið til heimið í seinasta lagi 03.02.2001.

Vit rudda á brúktbilagoymsluni

Avheintingartilboð, vegna plásstrot t.d.

**Ford Sierra aut. Sýn: 03/99**
**Árg.: 11/87 Km: 119.000**
**Prísuppskot: 15.000,- Nr.plátur: Nei**

**VW Passat Stc Turbo Diesel Sýn: 11/98**
**Árg.: 07/86 Km: 217.000**
**Prísuppskot: 15.000,- Nr.plátur: Nei** Diesel

**VW Golf Sýn: -**
**Árg.: 86 Km.: 180.000**
**Prísuppskot: 5.000,- Nr.plátur: Nei**

**Isuzu Pickup Chassis Diesel Sýn: -**
**Árg.: 87 Km.: 104.000**
**Prísuppskot: 3.000,- Nr.plátur: Nei** Diesel

**Nissan Cabstar Sýn: 12/98**
**Árg.: 04/88 Km.: 143.000**
**Prísuppskot: 3.000,- Nr.plátur: Nei**

**Opel Kadett Glasvan vøruvognur Sýn: 11/98**
**Árg.: 10/88 Km.: 153.000**
**Prísuppskot: 18.000,- Nr.plátur: Ja**

**Mazda 323 1,3 Panelvan vøruv. Sýn: 11/98**
**Árg.: 86 Km.: 86.000**
**Prísuppskot: 13.000,- Nr.plátur: Ja**

Bilarnir kunnu síggjast á verkstaði okkara

Treytin er:
- at bilarnir skulu avheintast í tí standi teir eru.
- At bilurin er goldin og avheintaður í seinasta lagi fríggjadagin 19.jan. 2001 kl. 12.00.

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35



# HEILSANIR



**Góði Andrias**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 18. jan. Eisini ein heilsan til Abraham sum fylti 1. des.
**Heilsan mamma og babba**



**Góða elskaða Hanna Sofía**
Mamma og babba vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við 1 ára degnum sum er í dag. Jesus pápi verði hjá tær. Vit elska teg.
**Ynskja mamma og babba**



**Góði abbi**
Tillukku við føðingardegnum.
**Heilsan Durita og Gunnhild**



**Góði babba**
Eg og mamma vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við 24 ára degnum, sum verður tann 20.01. Alt tað besta í framtíðini. Vit elska teg.
**Ynskja didda og mamma**



**Eftirlýsing**
Hevur nakar sæð hesa gentuna? Hon fyllir 25 ár. Hon er seinast sædd úti á Ísbjørnini 15.02.
**Heilsan Stølpus**



**Góði abbi**
Eg ynski tær tillukku við 90 ára føðingardegnum.
**Heilsan Eyðun**



**Góða fitta Hanna Sofía**
Omma og abbi vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag. Og ein heilsan til Tóka, sum fylti tann 03.01. Jesus pápi verði hjá tykkum.
**Heilsan omma og abbi**



**Góða Synnøve**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum, ið var 17.01., við Guds signing í framtíðini.
**Heilsan tín Ásbjørn**



**Góðu abbar**
Hjartaliga tillukku við 80 og 90 ára føðingardegnum.
**Heilsan John**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 90 ára føðingardegnum.
**Heilsan tíni 10 abbabørn**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mikudegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:..................................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**